# RISARNIR HITT




**HM2010** Tá Ongland og Týskland fara út á vøllin í Bloemfountain í Suðurafrika verður tað sjeyndu ferð, at londini møtast í einum HM ella EM-endaspæli

Heri Simonsen

Týskland og Ongland spældu fyrsta skrásetta landsdystin á Deutches Stadion í Berlin tann 10. mai í 1930. Dysturin endaði við javnleiki 3-3. Síðani tá hava Týskland og Ongland – um vit also rokna Vesturtýskland sum umboðandi søguna hjá Týsklandi sum fótbóltstjóð – spælt 27 landsdystir. Ongland hevur vunnið 12 av teimum, Týskland hevur vunnið 10, meðan talan er um fimm javnleikir. Ongland og DDR – Eysturtýskland – spældu fýra landsdystir, árini millum 1963 og 1984. Ongland vann tveir, DDR vann ein, meðan ein endaði við javnleiki. Ongland og Týskland hava spælt 9 landsdystir, har stig í einari undankapping, ella víðari luttøka í einum HM ella EM-endaspæli hava staðið uppá spæl. Og tað eru hesir 9 dystirnir vit eiga at dvølja við, tí hinir 18 hava bert verið vinardystir, sum sjáldan gerast minniligir.





## HM finalan í 1966

Tann fyrsti landsdysturin millum Ongland og Týskland sum taldi nakað, gjørdist ein tann minniligasti dysturin í heimsfótbóltssøguni. Talan var um sjálva HM-finaluna á tí víðagitna Wembley leikvøllinum tann 30. juni í 1966. Ongland vann finaluna 4-2 aftaná longda leiktíð. Dysturin var upphavið til ta stóru rivaliseringina, sum hevur verið millum londini á fótbóltsleikvøllunum síðani. Onkur hevur tikið til, at fyrr kríggjaðust londini á vígvøllum, nú hava Ongland og Týskland flutt kríggið til fótbóltsvøllin. Ongland førdi 2-1 ímóti dystarenda í vanligu leiktíðini, men týskarum líkt, so javnaðu teir til 2-2 stutt áðrenn vanliga leiktíðin var farin. Í longdu leiktíðini hendi ein hin kendasta hendingin í fótbóltsheimssøguni. Í fyrra hálvleiki í longdu leiktíðini skeyt Geoff Hurst eitt gott skot sum tók undirsíðuna av yvirleggjarunum og fór..? Og tann spurningurin stendur opin enn í dag. Spyrt tú onglendingar so siga teir, at bólturin var inni. Spyrt tú týskarar, so var bólturin ikki inni. Spyrt tú øll onnur, so ivast tey, um hvørt bólturin var inni ella úti. Linjuverjin úr Sovjetsamveldinum, Tofik Bahkramov fekk sannført sveisiska dómaran, Gottfried Dienst um, at bólturin var inni, og Gottfried Dienst dømdi mál til Ongland. Áðrenn alt var liðugt økti Hurst til 4-2, og meginparturin av teimum 98.000 áskoðarunum á Wembley kundu fegnast stórliga. Í hugaheiminum hjá týskarum gjørdist talan um nakað, sum mátti hevnast, og tað hava teir eisini sanniliga gjørt síðani 1966.

**INNANFYRI?**

*Tann spurningurin verður enn diskuteraður tann dag í dag. England vann sítt fyrsta og einasta HM-heiti tann dagin í 66 á Wembley leikvøllinum*



*Ein av bestu ensku landsliðsmanningunum nakrantíð, mátti sleppa HM-dreyminum eftir brotsspørk í Italia 1990. Meðan týskarar sjálvsagt gleðast, gevur Lothar Matthäus sær tó stundir til at ugga Chris Waddle hjá Ongland*

**BROTSSPØRK**



## HM-fjórðingsfinalan í 1970

Týskarar tørvaðu bert at bíða eitt HM-endaspæl fyri at fáa hevnd fyri tapið og dómaraavgerðina í 1966. 14. juni í 1970 møttust liðini í HM-fjórðingsfinaluni í Léon í Meksiko. Aftur hesaferð spældu liðini javnleik 2-2 í vanligu leiktíðini, men hesaferð vóru tað týskarar sum vóru omaná. Ongland var á odda 1-0 í hálvleikinum, og teir komu eisini á odda 2-0 tíðliga í seinna hálvleiki, men sum so ofta í tí stoltu týsku fótbóltssøguni, so komu týskarar afturíaftur, og í longdu leiktíðini søkti »Der bomber« Gerd Müller enska liðið. Onglendingar skyldaðu uppá, at fantom-málverjin, Gordon Banks var sjúkur, og ikki kundi spæla, men ósigurin skyldaðist heldur, at venjarin Alf Ramsey tók Bobby Charlton av vøllinum, meðan Ongland enn var á odda. Óansæð undanførslurnar, so hevði Týskland sært Ongland á fyrsta sinni í einum endaspæli.

## HM-millumspælið í 1982

12 ár gingu, áðrenn londini møttust aftur í einum HM-endaspæli. Ongland megnaði ikki at spæla seg í HM-endaspølini í 1974 og í 1978, meðan Týskland gjørdi bart við at vinna HM í 1974, og EM í 1972 og í 1980. Haraftrat spældi Týskland seg í EM-finaluna í 1976, sum teir taptu ímóti Kekkoslovakia aftaná brotssparkskapping. Í 1982 møttust liðini í HM-millumspælinum á Santiago Bernabeu í Madrid, talan gjørdist um ein dramatiskan 0-0 javnleik, har Ongland og Kevin Keegan áttu at avgjørt dystin. Tað komu onglendingar at angra. Týskarar vunnu 2-1 á Spania, meðan Ongland bert fekk javnleik 0-0 ímóti Spania. Týskland spældi seg í hálvfinaluna, og fingu silvur aftaná eitt 1-3 tap ímóti Italia í finaluni.

## HM-hálvfinalan í 1990

Tað gingu átta ár, so var aftur ein hádramatiskur dystur á skránni